# Fyrst byggisamtykt – síðani summarhús



*Ovarlaga í Mykinesi er ætlanin at gera frítíðarhús einaferð í framtíðini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sørvágs kommuna fer at arbeiða víðari við málinum um, hvussu frítíðarhúsøkið í Mykinesi skal skipast**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*

**Mykines:** Fyrr í ár fekk Sørvágs kommuna eina umsókn frá Regini Joensen um loyvi at fremja ætlan sína við frítíðaríbúðum í Mykinesi.

Ætlanin hjá Regini og teimum sum arbeiddu saman um ætlanina var, at byggja íalt 16 íbúðir til tey ferðandi.

Tey hava sett fram ynski um eitt hóskiligt stað ovarlaga í bygdini, á einum staði tey nevna Kongsmørkin. Metti kostnaðurin fyri verkætlanina er umleið 7 mió krónur.

Ætlanin er at hava fýra eins íbúðir í hvørjari lon og við øllum tí, sum hoyrir til eina slíka. Byrjast skal við teirri fyrstu lonini og síðani byggja hinar sohvørt.

Á fundi í bygdaráðnum í Sørvági, sum Mykines er partur av, í farna mánaði kom henda umsóknin til viðgerðar sum eitt av málunum.

Umsóknin um hesar frítíðaríbúðirnar vann ikki frama tá. Men óhugsandi er ikki, at úrslitið kann gerast eitt annað einaferð í framtíðini.

Í viðgerðini í kommununi varð nevniliga víst á, at tekniska nevnd mælti til at gera eina byggisamtykt til frítíðarhús í Mykinesi.

Hetta verður gjørt eftir einum vegleiðandi skrivi frá løgmáláráðnum í mars mánaði í ár, har nærri reglur vórðu settar hesum viðvíkjandi.

Bygdarráðið í Sørvági samtykti at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og arbeiða víðari við málinum.




# Nú skal ruddast!

**Sunda kommuna fer nú at rudda allar almennar vegir og øki í kommununi. Bilar, bátar, amboð og annað, sum ikki hevur frámerki, ið sigur, hvør eigarin er, verður beint burtur.**

Øll, sum hava slíkt órudd standandi á almennum øki, verða biðin um at beina tað burtur í seinasta lagi 25. juli 2008. Órudd, sum ikki er burturbeint innan henda dag, fer kommunan at beina burtur. Kommunan tilskilar sær rætt at krevja útreiðslurnar av burturbeiningini endurgoldnar frá eigaranum.

Samstundis heitir kommunan vinarliga á øll, sum hava bilvrak ella annað órudd standandi á egnum øki, um at beina hetta burtur. Kommunan vil fegin leiðbeina nærri um hetta.

Les meira á www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA


# 4 av 10 fara at renna

Í hesum døgum verður seinasta hondin løgd á nýggju rennibreytina í Havn við navninum »Tórsbreyt«.

Eftir ætlanini verður arbeiðið liðugt í hesum mánaðinum, men tann stóri spurningurin er, hvussu nógv fólk fara at brúka henda nýggja møguleikan at renna undir skipaðum umstøðum.

Til tess at svara hesum spurningi hevur Tórshavnar Kommuna sett eina spurnarkanning í gongd á heimasíðu sínari. Spurt verður stutt, um tann einstaki ætlar at royna rennibreytina í summar.

Í morgun vísti úrslitið, at tað er rættiliga javnt millum tey, ið svara játtandi og tey sum svara noktandi. Talið er ávikavist 40 og 43 prosent.

Sløkt 17 prosent siga seg ikki vita.

**sb.**